

Nógv útgerð er komin til oljuhavnina í Runavík.

# Gongur væl í oljuhavnini undan boring

Jan Müller

05.05.2014 - 13:45

Oljan.fo

Leygardagin lossaðu tey aftur farm  í oljuhavnini í Runavík, sum er komin úr Noregi og skal brúkast til komandi tvær boringar á føroyska landgrunnium. Valdemar Olsen, sum stendur á odda fyri virkseminum á basanum, sigur við Oljuportalin, at tað hevur gingið sera væl at taka ímóti útgerð frá farmaskipi, sum nú hevur vitjað tríggjar ferðir.

Hann sigur, at nú er við at fyllast í oljuhavnini við rørum, konteynarum og aðrari útgerð, sum skal brúkast komandi mánaðirnar á feltinum. Stóri kranan, sum Atlantic Supply Base hevur leigað frá Mekanik, hevur eisini riggað sera væl. Talan er um ein krana, sum Mekanik hevur keypt til oljuarbeiði og aðrar uppgávur í Føroyum.

Í oljuhavnini bíða tey annars spent eftir, at boripallurin West Hercules skal koma í føroyskan sjógv og seta á at bora. Tá verður nógv virksemi í oljuhavnini. Veitingarskipið Sjóborg, sum Skansi Offshore eigur, fer at sigla millum pallin og oljuhavnina.

  